LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

MITSUBISHI GALANT
st. car til sølu. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 216166

VOLVO 240 GL
sælges billigt med nr. plader, pæn, kører dagligt, skal snart synes, alufælge + reservedele medfølger. kr. 5.500,-
Tlf. 373372 Søren, 229482 arb.

NISSAN BLUEBIRD DIESEL
Árg. 89 til sølu sum eykalutir. Prísur 1.000,-
Tlf. 222292

OPEL ASCONA TIL SØLU
1.6 Diesel, nýsýnaður og er sera økonomiskur.
Tlf. 252072

NISSAN SUNNY
Árg. 90 biliga til sølu, stereoanlegg fylgir við.
Tlf. 260161/315811

BLUE BIRD
frá 87 til sølu fyri 4.000 kr. Hevur ikki plátur. Nýggj pikadekk á sportsfelgum fylgja við. Bilurin hevur el-sóltak og el-rútar. Krevur smáar ábøtur.
Tlf. 509922 - 423109

BMW 520i TI LSØLU
Bilurin er frá nov. 91, hevur el-sóltak og sleipikrók. Anlegg við fjarstýring. Nýggir pyntilistar og pikadekk fylgja við.
Tlf. 315570 ella 580154

OPEL ASTRA stc. 1.6
rg. 11/97, 83.000 km, við automat gearum. Eykaútgerð: oljufýr, cd-anlegg, anhangarakrókur v.m. Kostnaður 62.000 kr.
Tlf. 320828

TIL SØLU
Mitsubishi L200 2.5 TDI Strada, árg. 03/2000, uml. 67.000 km, diesel. Prísur: 145.000 kr.
Tlf. 333571

MAZDA 626
diesel TDI, 104.000 km, til sølu fyri um. 108.000 kr. ella hægsta boð yvir.
Tlf. 508829

AUDI 100
Ein Audi 100, árg. 88, 2000, 150 hk, vetrardekk við felgum, cd-boks. Til sølu fyri 19.900 kr.
Tlf. 508236 / 449043, e. kl. 15

SUMMARDEKK
4 summardekk - sum nýggj 175/70 R 13. Prísur: 1.400,- kr.
Tlf. 227022/214160

FELGUR TIL TOYOTA COROLLA
4 felgur við summardekkum 175/65 R14 til sølu.
Tlf. 218159

LASTBILAR TIL SØLU
Scania 143 dumpari árg. 1988 og Scania 112 kranabilur árg. 1987, til sølu fyri hóskandi boð.
Tlf. 332468/216468

SLEIPIKRÓKUR TIL KIA SHUMA
Vegna feilkeyp, selist ein sleipikrókur til Kia Shuma fyri bert kr. 1.000,00
Tlf. 314103/216103

BILUR TIL SØLU!
Mazda B2500 v/ last sera hentur hjá bátaeigarun, bóndum, handverkarum o.ø.
Ring á tlf. 533636

TOYOTA COROLLA 2.0
til sølu, diesel, myrkbláur, árg. 1997, Sony anlegg, koyrt 153.000 km.
Ring 251016

CITROEN BX DIESEL
til sølu, árg. 92, ikki sýnaður.
Ring 262191

BMW 320i
til sølu, 186.000 km, árg. 91, undirvognur renoveraður.
Tlf. 219094 eftir kl. 17

SUMMARDEKK
4 nýggj summardekk stødd 185/65R14 til sølu.
Ring 744741

TIL SØLU
orginalar Peugeot alu.felgur, merki (cyclone). Passa m.a. til 306, 406, partner. 3000 kr.
Tlf. 222195

TOYOTA COROLLA 2.0
diesel, árg. 98, koyrt 135.000 km.
Tlf. 218355

OPEL ASTRA 1.7
diesel árg. 97, nýsýnaður, til sølu.
Tlf. 224238/423314

FORD ESCORT VAN DIESEL
Árg. 97, bláur metallakk. Bilurin hevur powerst., radio v/ bandspælara, 1 sett eyka felgur við dekkum. Er í sera góðum standi. Selist vegna keyp av størri bili. Til sølu fyri kr. 50.000,- + MVG.
Tlf. 311707/211707

FÓLKAVOGNUR (BOBLA)
góðum standi, árg. 73, 17.000 kr.
Tlf. 270628

FORD SIERRA
til sølu fyri 4.000 kr. árg. 86.
Tlf. 229213

MAZDA 323
til sølu fyri 20.000 kr. Hann er nýsýnaður, sær gott út. Hevur 15" sportfelgur við heilársdekkum.
Tlf. 256801

FORD ORION 1.8 DIESEL
rg. 92, motorur í góðum standi. Bilurin krevur ábøtur. Prísur 5.000 kr.
Tlf. 225032

DATSUN CHERRY
frá 85 til solu sum eykalutur. Motorurin er í góðum standi.
Tlf. 264228

NÝSÝNAÐUR NISSAN
Ein Nissan Sonny, nýsýnaður, biliga til sølu.
Ring 505011/221577

TIL SØLU
Senkisett til Honda Civic 1.4 IS árg. 98. 50 mm ongantið brúkt, selist fyri uml. 1.700 kr. Nýprísur 2.400 kr. Eisini seljast 4 felgur við brúktum dekkum.
Tlf. 222323

MYRKABLÁUR AUDI 80
rg. 87, til sølu. Koyrt 212.000 km, sýnaður í feb. 2004, bremsur, stoytdoyvarar og varmaapparat eru nýggj. Í góðum standi.
Tlf. 310561

FORD ESCORT VAN 7S 1.8
til sølu, árg. 2000, bert koyrt 4500 km, er sum nýggjur. Kr. 69.500,-
Tlf. 211655

OPEL ASCONA
Árg. 87 til sølu. Vælegnaður sum eykalutir. Eisini fáast aðrir deilir, somuleiðis til Opel Ascona.
Tlf. 229633 (Nølli)

BILUR TIL SØLU
Bilur við ongum plátum til sølu. Ein Peugeot 306 S16, koyrt 145.000 km, 8 ár. Nýggjar sportfelgur og dekk. Toppaknningur skiftur í ár.
Tlf. 263680

FORD SIERRA TIL SØLU
Ein vínreyður Ford Sierra 2.0i við motorskaða, árg. 91, sær sera gott út, alu sportfelgur fylgja við. Ringið og hoyri nærri, til sølu fyri 7.000,-
Tlf. 371291

TOYOTA CAMRY 1.8
sær gott út, koyrt 135.000 km, prísuppskot 20.000 kr.
Tlf. 270953

TOYOTA COROLLA 2.0 DXL
Árg. 97 til solu.
Tlf. 228514

SUMMARDEKK
2 Yokohama 175/65 R14, lítið brúkt, til solu.
Tlf. 211863

FORD SPORTFELGUR
originalar sportfelgur til Ford Fiesta til solu.
Tlf. 210132

FORD SCORPIO 2.5 TD SEDAN
Árg. 91 til sølu. Bilurin er silvurgráur, hevur tokulyktir, alu-felgur, el-rútar fr., el-spegl við varma, sóltak og fløguspælara. Sýnaður des. 03.
Áhugað ring 268650

VIÐFESTISVOGNUR
Kvik trailer 500 kg. við dúki og nasahjóli, ongantíð brúktur. Til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 741225 eftir kl. 17

TIL SØLU
eru 4 stk. lítið brúkt Goodyear summardekk stødd 165 x 13","Tlf. 775556

FELGUR
Fýra 12" felgur v/ summardekkum, passa til Suzuki Carrier, bíliga til sølu.
Tlf. 422343/722343

BILUR TIL SØLU
Ein Volkswagen Passat 32, árg. 87, nýsýnaður, er í góðum standi, til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 741225 eftir kl. 17

FORD FOCUS TREND 1.6i
svartur, sportfelgur, sportsetur, hita í setrinum, el rútar fr. tuningsútstoyt, cd-spælara, bíliga til sølu, sera bíliga!
Tlf. 261595

KIA SEPHIA TIL SØLU
Árg. 98, 77.000 km, til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 229735/580004/448167

TIL SØLU
Sportfelgur av merkinum Venom PSV, hava verði brúktar til Carina E. Stødd: 17" Breidd 7,5" Prísur 4000 kr.
tlf. 282323

GÓÐUR BRÚKTUR
Góður brúktur gearkassi til Suzuki Baleno 1300, árg. 99, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 320470/270705

HEILÁRSDEKK
4 Ceat heilársdekk til sølu. Stødd. 185/75 R14 C 102/100 P 8PR.
Ring 225159

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
frá 1992 til solu. Bilurin hevur koyrt 146.000 km og er í góðum standi.
Tlf. 310721 ella 215721

FORD FIESTA
árg. 90, nýsýnaður, bíliga til sølu.
Tlf. 252841

TOYOTA CARINA II
árg. 88 í góðum standi, nýsýnaður, bíliga til sølu.
Tlf. 361803

TIL SØLU
Volvo 240 GL sedan, árg. 87, kører dagligt, pæn, alufælge + mange reservedele medfølger. Skal synes. Sælges p.g.a. flytning til Danmark. Pris ide 6.9.00 kr.
Tlf. 373372, Sørin 229482, arb.

SUM NÝGGJUR
Reyður Honda Accord 1.8i árg. 98, 83.000 km, nýsýnaður, cd-spælara, centr. lás o.a. Sum nýggjur, ein eigara. Prísuppskot kr. 89.000,-
Tlf. 243445 ella 421787

HONDA TIL SØLU
TRX 450 FE Fourtrax 4x4 hjulstrekt súkkla. 433cc (17,8 kw) elskift gear og elskift 2 og 4 hjulstrekk.
Tlf. 506553

Amboð

BLANDIMASKINA YNSKIST
Brúkt blandimaskina ynskist til keyps.
Tlf. 520850

PLENUKLIPPARI
til solu fyri 200,-
tlf. 312915 eftir kl. 18

Arbeiði

TIMBURARBEIÐI
Tilboð ynskist upp á gerð av gjøgnumgangandi kvisti.
Tlf. 313799 - 221158

ARBEIÐI SØKIST
14 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð og í vikuskiftum. Alt hevur áhuga.
Tlf. 315290/265160

BROTFLÍSAR
Tilboð ynskist upp á at leggja nakrar brotflísar.
Tlf. 448271

MANGLAR TÚ ONKRAN
at gera reint fyri teg nú summarið er í hondum. 38 ára gomul kvinna átekur sær at gera reint fyri fólk í Havnini. Ring og hoyr nærri
tlf. 509336

SEYMING
Eg átaki mær alla vanliga seyming, umvæling, upplegg o.a. Eisini før. búna.
Tlf. 423744/251363

TILBOÐ YNSKIST
Er tað nakar, sum kann átaka sær at skifta tak á einum sethúsum í Streymnesi. Tilboð ynskist.
Tlf. 422358

FÁ. HÚSAUMVÆLING OG HÚSASMÍÐ
Alt timburarbeiði verður gjørt. Nýtt sum gamalt, úti sum inni. Royni okkum.
Tlf. 215214

Barnaansing

KONA/GENTA SØKIST
at ansa eftur tveimum børnum frá 9.00-16.00 frá fyrsta juni til hálvan juli.
Tlf. 314874/215274

Barnaútgerð

BRIO STÓLVOGNUR
v. posa og beslagi, til solu fyri 2700 kr. nýprísur 4800 kr. Stólurin er næstan ikki brúktur. Hevur vanl. hjól og er myrkabláur.
Ring 261166

KOMBIVOGNUR
við góðum koyriposa og uppreiddari lift til sølu. Puslitaska og eyka madrassa fylgja eisini við.
Tlf. 210382

Bátaútgerð

FRÍTÍÐARBÁTUR TIL SØLU
Ein Sea Star 800 við nýggjum Volvo 200 HK gongur 38-40 míl. Báturin hevur alla útgerð og er í góðum standi.
Tlf. 219545

TIL SØLU
Ein Zodiack gummibátur við 2x 60 HK Yamaha motori til sølu. Báturin gongur 36 míl.
Tlf. 580299/253446

NEYST
Oyrarbakka til sølu, um hóskandi boð fæst. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 212330

TIL SØLU
Ein 25 fót stórur súðubygdur Tresfjord-bátur til solu við ongum fiskiloyvi. Báturin er úr timbri og hevur ikki dekk. Prísuppskot: 45.000 kr.
Tlf. 250795 / 448120

EGNINGARTRAKT
og 40 stampar við stokkum, til sølu.
Tlf. 361090/218838

AQUA STAR 28
Vælútgjørdur bátur við fiskiloyvi, spildurnýggja DNG snellu.
Áhugað ringið 318649/229088

YNSKIST TIL KEYPS
Jolla ella minni bátur úr glasfipur ynskist til keyps.
Tlf. 506298 eftir kl. 17

ARAMIS 30 FÓT TIL SØLU
Báturin hevur fiskiloyvi, snellur, 175 HK motor, lit ekkolodd og VHF. Prísur 270.000,- við mvg. www.bat.fo
Tlf. 213800

STIGFJORD 28 TIL SØLU
Klárur til fiskari við fiskiloyvi, snellum og línuspæli. Annar bátur kann ganga inn í handilin. Sámuligur prísur. www.bat.fo
Tlf. 213800

VOLVO PENTA
Tamd 31A bátamotorur til solu.
Tlf. 211027

JOLLA
Glasfipur jolla til solu. L. 495 b. 180.
Tlf. 252453

EGNINGARTRAKT
ynskist til keyps.
Tlf. 229080

LÍNUSPÆL
1 linuspæl til solu.
Tlf. 371681

TIL SØLU
13 føtur glasfipurjolla v/ bátavogni (nýsýnaður) í sera góðum standi. Uttan motor. Kann eisini seljast hvørt sær. Um hóskandi boð fæst.
Tlf. 252829/263644

BÁTUR TIL SØLU
Ein Aqua star 33 til solu. Hevur alla útgerð, max. ferð 14 míl. Klárur bæði til línu og snellu, verður seldur við fiskiloyvi fyri 550.000 kr.
Tlf. 333028/282499/288499

PÁHANGSMOTORUR YNSKIST
Hevur tú ein páhangsmotor standandi, so eri eg áhugaður. Alt hevur áhuga.
Tlf. 268584/371887

37 FÓT GLASTREVJABÁTUR
við fiskiloyvi 5A og nógvari útgerð, til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 215813

Bingo

GOTT BINGO
verður leygardagin 15. mai kl. 20.00. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba leygarkvøldið 15. mai kl. 20.00.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Framtíðini 26. mai kl. 19.00.
Vágs Pensionistafelag

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 13. mai kl. 19.30. Gávubræv á 1.000 kr. á lutaseðli. Gávubræv á 500 kr. til fulla plátu.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 17. mai, kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Til fulla plátu gávukort og aðruhvørja ferð stórt turt tjógv. Høvuðsvinningar á lutaseðlinum er ein apexflogferðaseðil.
Astma- og Allergifelagið

GOTT BINGO
Verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 13-05 kl 19.00. Høðusvinningur ein Apex ferðaseðil frá Atlantsflog og nógvir góðir vinningar. Koyring heim aftaná. Øll eru vælkomin
Argja Róðrarfelag

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur bingo í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 12. mai kl. 18.00. Limirnir kunnu taka gest við.
Penisonistafelagið í Havn

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 16. mai kl. 16.00. Gávukort til øll spølini 75-150-500 kr. Á lutaseðli 12 x 100 kr. 2 x 500 kr. og eitt gávukort frá Smyril Line uppá 3.000 kr. Bingola, eykaspæl, koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

SUÐUROYAR NORÐARA DANSIFELAG
Gott bingo verður í høllini mánadagin 24. mai kl. 19. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Nevndin

Bøkur

TIL SØLU
Illustreret videnskabbløð til solu.
2-12 1984,
1-7 1985,
2-14 1997,
1-15 1998,
1-16 1999,
1-7 2000 alt fyri kr. 250,-.
Facts og fænomener árgang 1995 til solu fyri kr. 40,-
Lexicon árgang 1991, 1992, 1993 alt til solu fyri kr. 90,-
Tlf. 261670

SKALT TÚ Á FHS?
Leitar tú eftir brúktum bókum til FHS, ið seljast bíliga, so ring til mín!
Helena 220409 innan 20. mai

Burturm. /funnið

LANDSDANSISTEVNAN
Slikt, sum gloymt er eftir á landsdansistevnuni á Giljanesi, fæst aftur við at ringja á tlf. 333820 (í arbeiðstíð) ella á tlf 220507.
Vága Dansifelag

JEG HAR MISTET
min pengebog lørdag nat ved Havnar Bio. Den er grøn og hvid, og der lå billeder og diverse hævekort i den. Har du fundet den så ring på
0045 56480799

SVØRT LEÐUR,
akslastaska »Bøssetaske«, á stødd við eina bók, 4 lummar, burturmist antin umborð á Dúgvuni ella (í bilinum) uttanfyri ítróttarhøllina á Skála. Innihald: Heilivágur, lyklar, pípa v. tubbaki, úttøkukort til sparikassa o.a. Um tú hevur funnið taskuna, vinarliga
ring: 225263

HYGG HER!
Pengar eru funnir uttan fyri Sparikassan í Hornabø 20.04.04. Um tú hevur mist pengarnar, so ring
tlf. 351710

Býli

PARTVÍST MØBLERAÐ
verilsi til leigu til ein ið hvørki roykir ella drekkur.
Tlf. 513232

FRÍTÍÐARHÚS Í NÓLSOY
Slappa av í gomlu Petersen húsunum (nýrenoveraði).
Tlf. 212717/222327

EG SÓKNIST
eftir einum kjallarahøli ella líknandi sum eg kann brúka sum atelier – helst heilt bíliga. Ring til mín
tlf. 264603

TIL LEIGU
Hús miðskeiðis í Havn til leigu frá 1. juni.
Tlf. 327141, e. kl. 17.00

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru eitt ungt, friðarligt par, ið søkir íbúð í Havn. Bæði hava fast starv, fara væl um og gjalda rættstundis.
Tlf. 224211

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Íbúð til leigu í juli og august, Ydre Nørrebro, 58 fermetrar. Leiga: 2000 um vikuna.
Tlf. 35841102/28461128

HÚS Í SUNDALAGNUM
Vit eru í íbúðarneyð og sóknast eftir húsum í Sundalagnum, at leiga frá 1. juli ella 1. august.
Tlf. 508140 el. 0045 43533350

ÍBÚÐ Í ONGLANDI TIL LEIGU
2-rúms íbúð í Birmingham til leigu í summar heilt bíliga. Hon er tøk frá umleið 1. juli til seinast í september. Ert tú í umráðnum um hesa tíðina kanst tú gera kvettið og fáa ein sera góðan prís. Skriva meyl og frætt nærri.
saved_and_happy@hotmail.com

HÚS TIL LEIGU
Hús miðskeiðis í Tórshavn til leigu frá 1. juni.
Tlf. 327141 eftir kl. 17.00

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST Í KLAKSVÍK
Kvinna við 3 børnum ynskir íbúð/-hús í Klaksvík. Eru álitandi, røkin og friðarlig.
Tlf. 272566

HØLI TIL LEIGU
Høli í Dr. Jakobsensgøtu til leigu. Hølini eru vælegnað til handil, skrivstovu ella annað endamál. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1830/3

HÚS YNSKIST TIL LEIGU
Hús, helst við garagu ynskist til leigu í Tórshavnar umráðnum, max. 6.000 kr. frá 1.09.04.
Tlf. 224910/317865

SUÐUROY
Nýumvæld hús í Trongisvági til sølu. www.solberg.fo/hus.htm
Tlf. 372800

FERÐAST Í SUÐUROY?
Hús í Líðini á Tvøroyri eru til leigu vikuskifti og styttri tíð, vanligir hentleikar eru.
Tlf. 222684

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
helst á Norðasta Horni.
Tlf. 310760/268880

ÍBÚÐ YNSKIST Í EYSTUROYNNI
skjótast gjørligt. Fari væl um og gjaldi til tíðina. Hava tit eina at leiga mær kunnu tygum ringja
Tlf. 226540

HJÚN
Hjún við 2-ára gamlari dóttur ynskja íbúð/hús til leigu í høvuðsstaðarøkinum frá juli ella august. Fara væl um og roykja ikki.
Anna og John Eystberg, tlf. 32969829/28294405

STÓR ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN
Stór íbúð í Tórshavn til leigu fyri kr. 5.500 um mðr. + ljós og varma. Sera gott útsýni.
ibudtorshavn@hotmail.com

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
Par við 2 børnum ynskir íbúð ella hús til leigu í Havn.
Tlf. 251303/222955

HÚS Í RITUVÍK
Eini hús til leigu í Rituvík.
Tlf. 267544

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Ungt par søkir íbúð í KBH. Alt hevur áhuga. Gjalda til tíðina. Roykja ikki, hava fast arbeiði.
Tlf. 0045 50546359 Jóhann, 244443 Randi

HÚS Í HAVN YNSKJAST TIL LEIGU
Vit eru ein familja við 2 børnum. Alt hevur áhuga.
Tlf. 314874/215274

HÚS YNSKJAST TIL KEYPS ELLA LEIGU
Vit eru ein familja við 2 hálvaksnum børnum, ið ynskja eini hús í Hoyvík til keyps ella leigu. Vit hava bæði fast arbeiði, og hevur hetta skund, tá ið vit eru uttan bústað fyrst í juni.
Vinarliga ring tlf. 214133

ÍBÚÐ SØKIST
Kvinna søkir íbúð í Havn. Alt hevur áhuga.
Ring 270589/318580

SETHÚS Í VESTMANNA
til sølu. Eldri sethús í Vestmanna til sølu um hóskandi boð fæst. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 424792

ÍBÚÐ SØKIST
Einlig mamma við tveimum børnum, 6 og 11 ára gomul, søkir íbúð í Tórshavn. Havi fingið læruplass í býnum og skal byrja tann 2. august. Royki og drekki ikki, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 445068

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH
Friðarlig hjún – roykja ikki – við 6 mðr. gomlum barni søkja 3 rúms íbúð á minimum 60 kvadratmetrar í Keypmannahavn, helst nærhendis Ballerup. Leigumálið skal verða til min. januar 2008. Kunnu flyta inn beinanvegin.
Áhugað ringi tlf. 32553411 ella 25622944

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 221158/313799

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð í Havn frá 1. aug. 2004. Fara væl um og gjalda til tíðina. Kostnaður max. 4.000,- um mánaðin.
Tlf. 264462

BÝTA UM ÍBÚÐ?
Íbúð í innara KBH ynskist í býti við íbúð mitt í býnum í Tórshavn. Vit eru eitt par, ið ætla okkum at vera burtur frá 3. juli og 5 vikur fram. Hevur hetta áhuga, vinarliga ringið
316103/218250 ella 225972

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Íbúð til leigu á Eysturbrúgv í juli mánaðar til ferðandi.
Tlf. 39272536/26252536

ÍBÚÐ SØKIST
Eg eri ein 21 ára gomul genta, ið søki íbúð, drekki, royki ikki. Havi fast starv, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 227092

ELDRI HÚS
ynskjast til keyps í Suðurstreymi, max. 700.000 kr.
Tlf. 270494

YNSKIST TIL KEYPS
Hús á Tvøroyri ynskjast til keyps. Vit eru ein familja við 2 børnum. Alt hevur áhuga.
Tlf. 372045

SKALT TÚ TIL HAVNAR
og vil búgva væl, so er møblerað íbúð til leigu, 112 fermetrar við øllum heintleikum, vikuskifti ella styttri tíð. 700 kr. um dagin, seingjarkleæðir 50 kr.
Tlf. 218664

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Søknast verður eftir íbúð til framleigu í København ella nærhendis frá sept. til desember 2004. Kann vera møblerað.
Tlf. 313372 ella teldupost: olselsba@hotmail.com

ÍBÚÐ Í BRØNSHØJ
Lítil íbúð í Brønshøj til leigu í tíðarskeiðinum umleið 1. juni til 31. juli. Fyri kr. 200 um dagin. Um onkur kundi hugsa sær at leiga íbúðina fyri alt tíðarskeiði, kunnu vit tosað um prísin. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 28344662/258833

Dýr

BÚR TIL DVØRGAHAMSTRARAR
ynskist til keyps. Vinarligast ring
tlf. 315390/265390 eftir kl. 17

VAKRIR KETTLINGAR
kunnu avheintast beinanvegin, eru blandaðir angora (tjukkan pels) og við tumlum.
Tlf. 314857/514857

FØROYA FITTASTI
ferfætti fressur, 5 mðr. gamal – fæst við at ringja
tlf. 371825

FITTUR OG KELIN
kettlingur (ketta) 10 vikur gamal verður latin djóravini. Er hvít við flekkutum høvdi og hala.
Tlf. 318824

UNDULATUR TIL SØLU
Ein undulatur við búri og leikutoyi til solu.
Tlf. 320345

ET SAKNI EITT HEIM
Eg sakni eitt trygt og gott heim. Eg eri reinligur og dugi at eta sjálvur. Eg eri klárur at flyta heimanífrá, men fari bert til kettuvinir.
Ring 503300

HUNDAHVØLPAR
Ektaðir Golden Retriever hundahvølpar til sølu, ættartalva fylgir við. Kunnu latast um mánaðarskiftið mai/juni. Áhugað kunnu ringja og frætta nærri.
Tlf. 318811 ella 222756

UNDULÁTUR TIL SØLU
6 mðr gomul hon undulátur til solu fyri 150 kr.
Tlf. 722771

HUNDAHVØLPUR
Ein sera fittur hundahvølpur verður latin djóravini.
Tlf. 374600

HORVIN KANIN
Hevur tú sæð eina hvíta kanin við brúnum oyrum og einari brúnari striku eftir bakinum, ring so til mín.
Tlf. 218668/320383

FITTUR TÍKARHVØLPUR
verður latin djóravini, Rosa er 5 mðr og verður ikki stór. Áhugað kunnu ringja
tlf. 271495

TIL SØLU
Sera vøkur 4 ára gomul tilriðin ryssa úr Írlandi. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 533173

TIL SØLU
Undulátar v/ búri til solu.
Tlf. 456094/756094

TIL SØLU
1 ára gamal Variant hestatransportari til 2 ross.
Tlf. 533173

KETTLINGUR
Eg havi eina sera fitta og reinliga kettu at láta. Hon er svort við hvítari bringu.
Ring 265070 eftir kl. 16

KETTLINGAR
Vegna serligar umstøður verður søknast eftir djóravinarligum heimi til stóran kettling (frens). Hann er hvítur og gráur og sera fittur og alskin.
Tlf. 421081/508344

DVØRGAPAPAGEYKAR
Uml. 2 mðr. gamlir, búr við tilhoyr fylgir við. Virði 2.000 kr. Selist fyri 1.000 kr.
Tlf. 259164

ANGORA KANINUNGAR
til solu fyri 200 kr. stk.
Tlf. 223858

HEVUR NAKAR SÆÐ
okkara fitta hvíta og gráa frens? Hann er horvin við Villingadalsvegin 28. apríl.
Tlf. 319097/254459

AKVARIUM
óbrúkt, 65 l. til solu fyri einans 500,-
Tlf. 312915 eftir kl. 18

NAKRIR
dunnuungar til sølu.
Tlf. 441252/261983

DVØRGAHAMSTRARAR
Nakrir dvørgahamstrarar og tvey búr eru til solu.
Tlf. 721698 og 509630 - Annie

HEY GÓÐU DJÓRAVINIR
er tað ikki onkur, sum vil eiga meg.Eg eri fitt og glað hundatík, eg kann latast nú, um onkur vil hava meg.
tlf. 422175/722175

ER TAÐ NAKAR
ið hevur nakrar fiskar at geva mær? Vinarliga ring
tlf. 455266 ella 268732, Brynja

BORDER COLLIE
hundur verður latin djóravini, er vaccineraður.
Tlf. 455108

2 AKVARIUM
stødd 150 x 50 x 50 til sølu.
Tlf. 375133/575133

EIN FITT REYÐSTRÍPUT KETTA
við reyðum hálsbandi við klokku, er komin at ganga á Rosságotu á Argjum. Kennist nakar við hana, so ringið
tlf. 310721 ella 215721

Fundir

AÐALFUNDURIN
hjá Róðrarfelagnum Knørri verður í Føroya Studentaskúla leygardagin 22. mai kl. 11.00.
Broytingaruppskot skulu vera send nevndini í seinasta lagi 17. mai.
Róðrarfelagið Knørrur

UPPLÝSANDI FUNDUR
um TFT-viðgerðarháttin verður hóskvøldið 13. mai kl. 19 í Slættanesgøtu 5. Nærri fæst at vita
tlf. 318821

Húsarhaldstól

KØLISKÁP TIL SØLU
fyri 500,- bxh = 60 x 120 cm. Køliskápið er til skápsmodul.
Tlf. 444918

EIMHETTA
Frítt hangandi eimhetta 300 kr. Hvítt skáp 2 hurðar 3 skuffur 200 kr. til solu.
Tlf. 317118 -217118

TIL SØLU
Fritthangandi eimhetta til solu.
Tlf. 217118

KØLI/FRYSTISKÁP
Kombinerað køli/frystiskáp til solu vegna plásstrot. Væl viðfarið. Stødd 1,50x54.
Tlf. 423744/251363

Innbúgv

SONG TIL SØLU
Træsong úr furu, 93 x 208 cm. við nýggjari »Comfort« madrassu, tjúkd 18 cm. og botni til solu fyri undir hálvan prís, kr. 1.500,- vegna flyting.
Tlf. 322958

TIL SØLU
5 leðurstólar við høgum ryggleni keypt frá Ide til solu fyri 2.000 kr.
Tlf. 255279

VEGNA FLYTING VERÐUR SELT
Ein stórur leður lenistólur við skamli kr. 900.
Sofaborð úr glasi og messing og tvey síðuborð kr. 1.000.
Ljósakrúna úr stoypijarni kr. 800.
Briks 85x200 fyri kr. 300.
2 sengur fyri kr. 300.
2 seingjabotnar 85x200 kr. 100.
Kókipláta kr. 200.
Ein trykkspulari, merki: Karcher 520 M, óbrúktur, fyri kr. 1.500 (1/2 prísur).
Vinarliga ringi til 312164

TIL SØLU
Spildurnýggj 2 manssofa til solu. Ljóst leður. Nýprísur 2.100,- Nú 1.800 kr.
Tlf. 266306 eftir kl. 14

TIL SØLU
Ein boksmadrassa við toppmadrassu 120 x 200 við boylum undir, sær út sum nýggj, til solu fyri 1.000 kr.
Tlf. 310278/508699

REOLVEGGUR
Palisander reolveggur 2 sekt. skáp og hillar b. 175, h. 175 cm. 1.000 kr.
Tlf. 313936 eftir kl. 17

SJÓNVARPSBORÐ
úr lútaðum træi til solu fyri einans 300,-
Tlf. 312915 eftir kl. 18

SKRIVARABORÐ
úr lútaðum træi til teldu. Einans 500,-
Ring 312915 eftir kl. 18

MYRKT ANTIK BORÐ
v/ útskornum beinum, til solu. Mát: 95 b. 125 l. 76 h.
Tlf. 444307

INNBÚGV TIL SØLU
Box song v/ hvítum beinum og galvi 140 x 200.
Eik reol, 4 sektiónir v/ útskornum beinum, hillum, skuffum, glasskápi o.a. Mát: l. 1.80 b. 84 d. 43/25.
Tlf. 444307

VATNSONG YNSKIST
Fult dempað vatnsong við hita ynskist til keyps.
Tlf. 218796

Leikur

TIL SØLU
Pokemon, 2 game boy spøl, figurar, kort o.m.a. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 508790

RULLUSKOYTUR
Nýggjar rulluskoytur til nýbyrjarar, stødd 37, til solu fyri 200 kr.
Tlf. 311525/281525

Lutaseðlar

BYGDARFELAGIÐ VESTURSKIN
Lutaseðar fyri Bygdafelagi Vesturskin. Hesi nummur eru drigin.
1) 54128 2) 54591 3) 54101
4) 54150 5) 54512 6) 54710
7)53657 8)53676 9) 94424
10) 53913.
Vinningarnir kunnu avheintast á tlf 267473. Stóra takk fyri stuðulin.
Bygdafelagið Vesturskin, Kunoy

Matur

TIL SØLU
Rabarbur og rabarburøtur til solu.
Tlf. 311647

Pløgg

RASARA MC-JAKKI TIL M/K
Flottur jakki – medium – hvítur, stoff: nylon við vmiskum reklamum til solu, lítið brúktur, 300 kr.
Tlf. 212289

BRÚÐARKJÓLI!
Stødd 38, biliga til solu.
Ring 313967 ella 312404

KVINNUBÚNI TIL SØLU
Føroyskur kvinnubún við møttli til solu. Sum nýggjur, einans brúktur tvær ferðir. Silvurið er hestaskógvur og fyriklæði og turriklæði úr bláum silki.
Tlf. 216532

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður í Felagslonini í Fuglafirði friggjakvøldið 14. mai kl. 19.00.
Eldrafelagið Borgin

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45.
LÍF

Súkklur

AEROX-R SKUTARI
til solu fyri 13.000 kr. Hevur koyrt 5.500 km og er í sera góðum standi.
Tlf. 262221, e. kl. 15

APRILIA RX 50 TIL SØLU
Sær gott út og koyrir sera væl. Eykalutir fylgja við. Til solu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 509383

GENTUSÚKKLA
Std. 8 til 12 ár, trý gear, sum nýggj, til solu fyri 900 kr.
Tlf. 319604

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 fer